Suni Magnussen, fotohandlari selur bilar:

# – Bilar hava altíð havt mín áhuga

**Fotohandlarin í Havn hevur lagt myndir, filmar, disklar o. a. frá sær, og er nú farin at seljaBMW og Fiatbilar hjá Bilfríðkuni í Havn**

BILASØLUMAÐUR
*Eirikur Lindenskov*




*Suna hevur altíð dámað sera væl bilar – so nú er hann mitt í verðini…*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Eg havi altíð havt sera stóran áhuga fyri bilum, og eg havi altíð fjasast við bilar, sigur 42 ára gamli Suni Magnussen – ella Suni í Fotobúðini – sum vit eisini kenna hann.

Suni Magnussen hevur skift bransju – hann er farin at selja bilar í Bilfríðkuni hjá Ludvík Petersen í Havn Bilfríðkan selur bilar av merkjunum BMW og FIAT. Suni eigur Fotobúðina í Handilskjallanum í Havn, og har hevur hann starvast síðani 1977, tá hann fór í læru hjá Sigurði Bech. Tó var hann burtur frá eina tíð miðskeiðis í áttatiárunum, tá hann royndi seg sum bilasølumann hjá Ivan Johansen í hálvtannað ár.

Síðani Suni var heilt ungur hevur hann pilkað við bilar. Hann hevur eisini sett fleiri bilar í stand í smiðjuni hjá abbanum á Hoydalsvegnum.

– Meðan eg var hjá Ivani fekk eg tilboð um at taka yvir Fotobúðina, og eg tók av, sigur Suni Magnussen, sum síðani hevur átt og rikið Fotobúðina.

Men hann hevur kortini ikki heilt slept Fotobúðini:

– Eg havi gott fólk at hjálpa mær, og tí bar tað til hjá mær at royna okkurt annað. Ludvík og eg kennast væl, og vit hava so ofta tosað um tað, at tað hevði verið stuttligt hjá mær at roynt meg í hesi vinnuni – og nú bleiv tað so til tað, sigur Suni Magnussen, sum tó ikki heilt hevur slept fotohandlarayrkinum. Hann hevur ávísar uppgávur í handlinum sjálvur, so sum postin, bókhald, eins og hann stendur fyri skanningum av gomlum mynd o. l., men er tó til arbeiðis fullan dag hjá Bilfríðkuni.

Fyrstu Fordarnir:

# 20 hestakreftir og 2900 ccm

GAMLA TØKNIN
*Eirikur Simonsen*

Teir fyrstu Fordbilarnir, ið komu til Føroyar í tjúgunum, vóru allir nevnt eitt tons bilar. Motororkan var einki at geipa av, bert 11,1 skattaskyldu hestakraft, sum Ford kallar tað í einum brævi sent til »Færøernes Landfogedri«, dagfest 1. september 1923, har avsendarin er A/S Scania–Vabis & Raadvaddams , Ford–Depot. Men tilskilast skal, at veruliga orkan var 20 hk, og motorrúmdin var uppá 2900 ccm. Til samanbering kann nevnast, at slíkir motorar í dag eru frá 200 hk og uppeftir.

Brennievnisnýtslan var uppá umleið 6 km fyri hvønn liturin av bensini, men útlátið hevur verið ógvusligt í mun til tað, vit kenna til í dag. Koliltu prosentið (CO%) var vanliga umleið 12 til 18%, um hesin skuldi hava eina nøktandi tómgongd.

Í dag er tað kalla onki, men sjálvandi kravdi hetta eisini eina tilvenjing av tí persóni, ið skuldi koyra henda bil. Eitt nú skuldi bilførarin syrgja fyri, ímeðan hann koyrdi, tað var at lutfallið ímillum bensinið og luftina skuldi samsvara, men eisini skuldi ansast eftir tendringstíðini. Til hetta vóru hantak ella knarvar tøk inni í bilinum.

### Úr 6 voltum til 12 – og nú til 42

Dynamo og startara hevði bilurin, sum kom til Føroya, og var tað ein 6 volt skipan, sum skuldi syrgja fyri elektriskari orku til tendriproppar og tvær lyktir framman – onki við at hava høg og lág ljós – og eina aftan, so sjálvandi eisini uppløðing av akkumulatorinum.

Men hetta marglætið var lutfalsliga nýtt hjá Ford tá. Í trýssinum var spenningurin settur úr 6 til 12 volt, og í tí nýggju øldini, sum vit ídag liva í, er hetta farið upp til 42 volt, hetta orsakað av tí stóru streymnýtslu, ið vit hava til motorstýringar, bremsur, avfjaring, hentleikaskipan av ymiskum sløgum, trygdarskipanir o.s.v. fyri bara at nevna nøkur dømi uttan at koma í smálutir.



*Motormegin í teimum fyrstu Fordbilunum, sum komu til Føroya, var uppgivin til 11,1 »skattskyldugar hestakreftir«*

### Gear men onga kobling

Bremsurnar virkaðu bert upp á aftur hjólini, og vóru hesar mekaniskar, t. v. s. at stengur vóru samanbundnar frá fótpedali aftur í hjólini. Her er neyvan neyðugt at viðmerkja nakað.

Gearini vóry tvey fram og eitt aftur, skiftið fór fram við hjálp av fótpedalum og bremsu, ið hevði samband við tey sokallaðu planetgearini, kobling var ongin.

Planetgerrskipanin, ið her var brúkt, er næstan óbroytt í teim víðagitnu automatgirskipanum, ið fleiri av okkum kenna, og sum er eina mest nýtt í amerikanskum bilum upp gjøgnum tíðina.

Snilda uppfinnilsið, ið allir bilar enn brúka tann dag í dag er differentialið. Hetta varð eisini nýtt í Ford T bilinum tá, so har er sostatt ongin munur á í høvuðsheitum.

Róðurgreiðirnar vóru ikki at samanbera við tað, vit eru von við í dag. Strævi var at snara og trupult at halda beina kós, so at hugsa sær vegirnar tá…

Róðurið skuldi bert snarast tvey umfør borð í borð, men ein kendi ikki til annað, so hetta var óført.

Hjólini vóru framleidd úr dygdargóðum timbri líka sum karrosaríið eisini var tað. Til hetta arbeiðið var álitið sett á karetmakaran, sum var ein vanlig yrkisútbúgving tá.

### Talgilda tøknin avgerandi

Til seinast skal sigast, at grundsjónarmiðini til tað, vit kalla bilin í dag, eru í størsta mun varðveitt, men við tí talgildigu tøkni, sum er allastaðni rundan um okkum í dag – og í akførum, so er henda eisini heilt avgerandi fyri tann framburð, ið framtíðin ferð at bjóða okkum.

Olja sigst vera funnin við Føroyar, men tað veit ein og hvør, at verður olja vunnin úr undirgrundini, so er tað í eina avmarkaða tíð, at hetta letur seg gera. Tað er ikki sum við fiskinum, sum endurnýggjar seg sum eitt óendaligt ríkidømi.

Tí er gransking í øðrum orkusløgum komin rættuliga væl áleiðis, her verður einamest hugsað um vetnisevnafrøði við brennukømrum, sum so framleiða orku til elmotorar, sum drívmegi. Hesir verða royndarkoyrdir við lutfalsligum góðum úrslitum. Tí kunna vit, um granskarar eru eftirfarandi, vænta hesa orku sum vanliga drívmegi í akførum um 15 til 20 ár.

Oljuni mugu vit ansa væl eftir, um hon er har. Tað eru aðrir nýtarar, ið eru meira tilknýttir hana, t. d. elframleiðslan, skipini, ídnaður o. s. fr. Livst so spyrst.